# Bilar

Nr. 240 • mikudagur • 14. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

## Jeep Grand Cherokee 3.0 CRD

| | | | |
|---|---|---|---|
| Motorurin | 3.0 litur diesel V6 við 218 hk v. turbo og commonrail innspræning | Eginvekt | 2.100 kg |
| | | Viðførisrúm | 977 litrar |
| | | Prísur úr: | Vøruvognur (Laredo) |
| 0-100 km/t | 9,0 sek. | | Kr. 389.000 v/mvg. |
| Oljunýtsla | 9,8 (blandað koyring) | | Vøruvognur (Limited) |
| Max. Snúnings-moment | 510 Nm v/1600 Snúningum | | Kr. 436.000 v/mvg. |
| Dekkstødd | 245/65-17 | Søluumboð | Ivan Johansen Bilar |
| Stødd og vekt | | | Hoyvíksvegur 63 |
| Longd | 474,1 cm | | FO-110 Tórshavn |
| Breidd | 200,0 cm | | Tel. 313666 |
| Hædd | 174,4 cm | | www.ivan.fo |




*Jeep Grand Cherokee í nýggjastu útgávuni. Designið er heilt nýtt við lægri síðurútum og útbygdum skermum*

Jeep Grand Cherokee 3.0 CRD:

# Luksusjeepur við allari hugsandi útgerð

**At seta seg inn í nýggjasta Jeep Cherokee, er sum at koma í eina luksussuitu við allari útgerð. Amerikanararnir duga hatta við at gera flottar komfortablar luksusbilar**

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Flott kabina við leður og nøtutræpanelum og t.d memory-stilling av forsetrunum, 2-sonu klimaanleggi og pedalum, ið kunnu stillast aftur og fram elektriskt*

Amerikansku Jeep blivu kendir í seinna heimsbardaga, serliga fyri Willys-jeppin, sum verður gjørdu enn í dag, hóast nógv broyttur, undir navninum Jeep Wrangler. Jeep verða gjørdir í 6 ymiskum modellum, har tey flestu verða seld í Evropa.

Hóast tað ikki sær soleiðis út, er nýggi Grand Cherokee er bæði longri og breiðari enn forgangarin. Við tað at aksilfrástøðan eisini er longri, er kabinan eisini vorðin rúmligari. Designið er meira nútímans við lægri síðurútum og útbygdum skermum.

Bilarnir eru sera væl útgjørdir við t.d. leðurkabinu, 2-sonu klimaanlegg, parkeringssensorar aftan, pedalir sum kunnu stillast aftur og fram og regnsensorar til viskararnar.

Eitt sum merkist væl er, at koyrieginleikarnir eru munandi betri við nýggjari tannstongstýring og nýggjum framkomnum undirvogni. Koyrieginleikarnir eru tillagaðir til evropeisku vegirnar og eru fult á hædd við japansku og evropeisku kappingarneytarnar. Cherokee er eisini sera væl egnaður til at sleipa ein anhangara sum t.d. til hestatransport.

Grand Cherokee er sum ein persónbilur at koyra við á vanligum koyrivegi, og klárar seg avbera væl á óslættum undirlagi, hetta ger m.a. Quadra-Drive II skipanin, sum alla tíðina syrgir fyri, at rætta drívmegin er, har hon skal vera.

Cherokee fæst við tveimum V8 motorum upp á ávikavist 4,7 g 5,7 litur og við hesum 3,0 litur V6 turbodiesel við commonrail innspræning og 218 hk. Motorurin er ljóðleysur, kraftar væl og er sera kvikur.

Bilurin er so væl útgjørdur, at tað er nok lættari at siga, hvat hann ikki hevur av útgerð og trygdarútgerð. So gott sum alt er standard. Vit kunnu t.d. nevna leðurkabinuna við forsetrum at stilla elektriskt - við merory stilling, og pedalirnar kunnu eisini stillast aftur og fram, 2-zone klimaanlegg, fartpilot, parkeringssensorar og dekktrýstdisplay. Bilurin fæst í tveimum útgávum, Laredo og Limited, ið er luksusútgávan.







*Rúturin í baklúkuni kann latast upp sjálvstøðugt*